Undirvísingartilfar
At ferðast á netinum



5

# Happing á netinum

*Grundspurningur:*

**Hvat er happing á netinum, og hvussu kann slík happing handfarast?**

SSP

# Happing á netinum – Inngangur

Hetta heftið er nummar fimm í røðini av teimum seks tættunum til undirvísingartilfarið *At ferðast á netinum* og er til tín sum lærari, ið vil undirvísa og vegleiða næmingum at ferðast trygt á netinum.

At reika á netinum er ein natúrligur partur av gerandisdegnum hjá flest øllum, bæði børnum og vaksnum. Hetta setur krøv til skilagóðan atburð, og hvussu vit tryggja okkara privatlív, og hetta er nakað sum tú, sum lærari, kann hjálpa við.

Ein væl tilrættisløgd undirvísingargongd í ymiskum lærugreinum, har næmingurin fer í dýpdina saman við sínum floksfeløgum tryggjar, at evnið verður tikið í álvara og fær neyðuga viðgerð.

Somuleiðis er sera umráðandi, at foreldrini hava ein virknan leiklut. Fyri hvørt evni er ein heimasetningur, har foreldrini og barnið í felag viðgera ymiskar spurningar, ið stinga seg upp í kjalarvørrinum av kunningartøknini.

Ein slík skipað tilgongd er – saman við foreldrafundum og øðrum átøkum í SSP – við til at menta okkara børn og ungu til at gerast skilagóðir og vandaligir brúkarar, tá ið teir reika á netinum og brúka mongu pallarnir og samskiftishættirnar har.

**Ábyrgd:** SSP-ráðgevingin.
**Útgivið:** 2017/2022.
**Málbólkur:** Miðdeild 4.-6. flokkur.
**Lærugrein:** Føroyskt.
**Umbrotið, prentað og heft:** Føroyaprent.
**Samband:** Um tú sum lærari, foreldur ella fakfólk hevur spurningar ella tørv á vegleiðing til tilfarið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

SSP-ráðgevingin
R. C. Effersøesgøta 26
FO-100 Tórshavn
Tel. 30 24 80


















# Undirvísingargongd

| | |
|---|---|
| Skúlaár | |
| Skúli | |
| Floksheiti | |
| Floksstig | Miðdeild – 4.-6. flokkur. |
| Lærugrein | Føroyskt. |
| Lærari | |

| | |
|---|---|
| Heiti | At ferðast á netinum – Happing á netinum. |

| | |
|---|---|
| Førleikamál | **Støðisførleikar**<br>AT FYRIBYRGJA HAPPING Á NETINUM.<br>• At skilja happing á netinum og munin millum happing á netinum og happing andlit til andlits.<br>At virða onnur á netinum.<br>• Virðing fremur tryggleika og trivnað, ið eru við til at fyribyrgja happing.<br>At samskifta við onnur á netinum.<br>• Gott samskifti, har hugsanir, meiningar og spurningar fara millum børn og ung á netinum fremur trivnað og styrkir felagsskapir.<br>At finna loysnir.<br>• At duga at kanna møguleikarnar og finna loysnir, tá happing á netinum fer fram.<br>• At vita, hvønn man kann fara til og fáa hjálp.<br><br>**Fakligir førleikar**<br>TALAÐA MÁLIÐ.<br>• At lurta og spyrja um tað, ið sagt verður frá.<br>• At fata samskifti í mun til boðbera, móttakara, miðil og støðu.<br>SKRIVAÐA MÁLIÐ.<br>• At svara skrivligum spurningum ella á annan hátt vísa, at tað lisna er skilt.<br>• at finna høvuðsinnihald í tekstum.<br>• at gera skrivligar viðmerkingar til tað, hann/hon hevur hoyrt ella lisið.<br>• at skriva orð og styttri setningar við skilligari handskrift.<br>• at nýta fjølbroytt orðatilfeingi. |
| Tímatal | Undirvísingartímar tilsamans umleið 20.<br>Til evnið *Happing á netinum*, skulu nýtast 1-2 dupulttímar í føroyskum. |
| Undirvsingarmiðlar | Tilfar, sum er gjørt til hetta undirvísingarevni, næmingaskjøl og heimasetningur. |
| Arbeiðshættir | Floksundirvísing, bólkaarbeiði, framløgur og kjak. |

| | |
|---|---|
| Eftirmeting (sendast til SSP-ráðgevingina eftir útfylling) | Í hvønn mun eydnaðist undirvísingargongdin? |
| | Í hvønn mun rukku næmingarnir førleikamálunum? |
| | Var tímatalið hóskandi? |
| | Var tilfarið hóskandi? |
| | Hvussu eydnaðust ymsu arbeiðshættirnir? |
| | Uppskot til broytingar |

# Hvat er happing á netinum?

Best er at arbeiða við „Happing á netinum" eftir at næmingarnir hava arbeitt við *Orð hava vald*.

## Grundspurningur:

Hvat er happing á netinum, og hvussu kann slík happing handfarast?

## Samandráttur:

Næmingar tosa um jaligar og neiligar avleiðingar av samskifti við onnur á netinum. Tey læra um hugtakið „happing á netinum" og hjálpa læraranum at fylla inn talvuna, sum samanber happing andlit til andlits og happing á netinum. Síðan lesa tey eina søgu um ein næming, ið verður happaður á netinum, eyðmerkja leiklutirnar hjá persónunum í søguni og tosa um, hvussu happaði næmingurin man kenna seg.

## Lærusetningur:

- Næmingar liva seg inn í kenslurnar hjá teimum, sum verða happað á netinum.
- Næmingar læra at síggja mun og líkskap millum happing á netinum og andlit til andlits.
- Næmingar læra hættir at handfara happing á netinum.

## Fyrireiking:

Talva skal nýtast.

Skriva út *Næmingaskjal 1* „TikTok-søgan" (síða 11) til næmingarnar, ið arbeiða í bólkum á fýra ella fimm.

Skriva út *Heimasetningur* (síða 12), sum børnini fáa heim við til foreldrini.

*Upphiting (5 minuttir):*

### Spyr næmingarnar:

Hvat er gott við at vera á netinum?

### Dømi:

- Tú finnur kunning skjótt.
- Tú kanst hitta fólk.
- Vera saman við vinum.
- Tað er stuttligt.

Hóast mangt er gott á netinum er umráðandi at duga at handfara tær støður, næmingar kunnu koma í.

### Spyr næmingarnar:

Hvussu ber til at særa onkran á netinum?

### Dømi:

- Tá man sendir keðilig boð til onkran.
- Tá man argar onkran í flokkinum.
- Tá man ritar inn við loyniorðinum hjá einum vini og letur sum um, man er hann.

*Uppgáva 1: 10 minuttir*

# Hvat er happing?

Áðrenn næmingarnar skulu í gongd við uppgávurnar, er gott at teir fáa eina lýsing av happing og skilja upprunan.

## Spyr:

Hvussu skilja tit happing?

Hjálp næmingunum at seta orð á munin millum at happa og at arga. Bið gjarna um dømi.

## Eitt bólkafyribrigdi

Við støði í nýggjastu granskingini hjá EXbus (Kofoed & Søndergaard 2009; 2013) hava vit flutt okkum frá fatanini hjá Dan Olweus (1992/2000), sum hevði ta niðurstøðu, at happing hevði eina beinleiðis orsøk í einstaklinginum og hansara íbornu persónseginleikum, til at vit í dag skilja happing meira sum eitt bólkafyribrigdi, har orsøkin til happing kann stava frá eini avleiðing av negativum bólkadynamikkum. Tá ein felagsskapur er undir trýsti, kunnu nakrir næmingar uppliva angist fyri at verða útihýstir. Hendan angist kann síðani hava við sær ein tørv á linna, ið kann koma til sjóndar við at hesir næmingar sjálvir fara at framleiða vanvirðing móti øðrum í eini roynd at verða ein partur av einum felagsskapi aftur. Linnin virkar tó ofta bert í stutta tíð og kann tí síðani elva til sosialan ótta. Hesin óttin kann vísa seg við meir álvarsligari vanvirðing og útihýsing, sum vit kenna sum happing.




**Greið frá,** at fyri nøkrum árum síðani helt man, at happing kundi knýtast beinleiðis til tað einstaka barnið og at orsøkin til, at eitt barn happaði var, at tað var ónt og ágangandi, og at barnið, sum varð happað, var veikt og dugdi ikki at siga frá (Olweus 1992/2000). Av tí sama helt man, at um happarin fór úr flokkinum, so steðgaði happingin eisini, men her sá man skjótt, at happingin helt fram kortini, tí eitt annað barn kundi taka yvir og fara at happa í staðin. Síðani eru nógvar kanningar gjørdar í skúlum, og hesar vísa, at happing ikki snýr seg um ónd ella veik børn, men um felagsskapin í flokkinum. Tá felagsskapurin ikki hevur tað gott, so kann happing vísa seg. Tí tosa vit so nógv um felagsskapir í skúlanum í dag – eisini á netinum.

## Spyr:

Hvørjir felagsskapir eru tit limir av á netinum? (Dømi: Snapchat, TikTok, Instagram, Fortnite, Rocket League).

Greið frá, at alt hetta eru talgildir felagsskapir, sum tit eru ein partur av, tí her hava tit okkurt til felags við onnur: T.d. spæla saman við øðrum ella skriva saman á Snapchat. Men líka sum man kann uppliva happing andlit til andlits, so kann happing eisini fara fram á netinum, tá nøkur børn ikki hava tað gott í hesum felagsskapunum. Tó eru nøkur viðurskifti, ið gera happing á netinum serstaka, samanborið við happing andlit til andlits, og hetta er tað, vit nú fara at tosa um.

**Keldur:**
Kofoed, J. & Søndergaard, D. M. (2009): Mobning – Sociale processer på afveje. Hans Reitzels Forlag; Kofoed, J. & Søndergaard (2013): Mobning gentænkt. Hans Reitzels Forlag; Olweus, D. (1992/2000): Mobning i skolen. Hvad vi ved og hvad vi kan gøre. Kbh. Hans Reitzels Forlag.

*Uppgáva 2: 10 minuttir*

# Happing: Á netinum og andlit til andlits

## Spyr:

Hvussu halda tit, at tað kennist at verða happað/ur, og hví halda tit tað?

Hjálp næmingunum at seta orð á egnar upplivingar og at seta seg í støðuna hjá øðrum, ið hava upplivað happing. Felags kenslur eru ofta, at tey eru kedd, nipin, ill, og at tey kenna seg hjálparleys.

Bið næmingarnar greiða frá teirra fatan av hugtøkunum „happing á netinum" og „at standa fyri skotum".

Tekna niðanfyristandandi á talvuna:

| Happing andlit til andlits | Bæði | Happing á netinum |
|---|---|---|
| | | |

Greið frá, at har bæði eru munir og líkskapur millum happing andlit til andlits og happing á netinum. Lat næmingarnar vita, at bæði eru særandi fyri tann, sum stendur fyri skotum, men at tey eiga at læra munin ímillum hesi bæði, tá tey læra at handfara happing á netinum.

## Spyr:

Hvørjir munir og líkheitir eru millum happing andlit til andlits og á netinum? Skriva á talvuna tað, sum næmingarnir siga:

## Dømi happing andlit til andlits:

- Børnini kunnu fáa ein steðg frá happingini, tá ið tey koma heim.
- Tú veitst ofta, hvør happarin er, tá happingin fer fram andlit til andlits.
- Børnini, ið eru fyri happing andlit til andlits, fáa ofta bæði kroppsligan og sálarligan skaða.

## Dømi happing á netinum:

- Happing á netinum kann henda nær sum helst, eisini tá mann er farin í song.
- Happarar á netinum eru ofta dulnevndir.
- Happing á netinum elvir bert til sálarligan skaða (tó at tað kann víðkast til kropsligan skaða seinni).
- Børn nýta ofta harðari og meira særandi málburð á netinum, enn tey gera andlit til andlits.
- Happing á netinum kann vera sera almenn. Viðmerkingar kunnu deilast skjótt til nógv ókend fólk, tí kunning ferðast skjótt á netinum.

## Dømi um bæði:

- Báðir happingarhættir fáa børn til at kenna seg ótrygg, illa við, hjálparsleys, kedd og ill.
- Útihýsing: Børn kunnu happa við at útihýsa onnur fleiri ferðir á ymsan hátt á netinum og andlit til andlits.

*Uppgáva 3 (25 minuttir)*

# Lær at síggja happing á netinum

Tosa um tað at liva seg inn í kenslurnar hjá øðrum.

Bið næmingarnar minnast aftur á einaferð, teir hava livað seg inn í kenslurnar hjá onkrum øðrum, og bið tey deila hetta minnið við næmingin við teirra lið.

Gev næmingunum *Næmingaskjal 1* „TikTok-søgan (síða 11)" og lat teir lesa brævið hart og svara spurningunum. Næmingarnir arbeiða í pørum og svara spurningunum.

## Spyr næmingarnar:

- Hvussu er hetta happing?:
  - Svar: Marta fær fleiri keðilig og særandi boð í boðklivan í eitt longri tíðarskeið, og tá er talan um happing á netinum. Samstundis upplivir Marta eisini happing uttan fyri netið við at tey í flokkinum útihýsa og ignorera hana.

- Hvussu kann man melda onkran á TikTok?
  - Svar: Allir sosialir miðlar og spøl á netinum hava eina funktión, ið gevur brúkaranum møguleika at melda ella blokera ein annan brúkara, tá talan er um happing. Í flestu førum finnur tú hetta undir stillingar á appini/spælinum.

- Hvat kann Marta gera?
  - Svar: Marta hevur fleiri møguleikar.
    - 1. Strika brúkaran: Tað ber væl til at strika brúkaran fyri at fyribyrgja, at man fær fleiri boð, men tað kann vera keðiligt, um Marta elskar at vera á TikTok.
    - 2. Goym boðini og blokera happararnar: Um tú móttekur ljót boð á netinum, blokera viðkomandi og goym boðini (til dømis skíggjamynd), tí hetta er gott at hava sum prógv.
    - 3. Svara aftur: Man kann svara aftur, og tað hava børn ofta hug at gera, men man skal bara ansa eftir, at man ikki sigur tað sama og soleiðis ger, at støðan versnar og heldur fram.
    - 4. Sig tað við ein vaksnan: Tað er altíð eitt gott hugskot at siga tað við ein vaksnan, ið man hevur álit á, so man ikki situr einsamallur/einsamøll við tí, og sum kann hjálpa at steðga tí. T.d. foreldrini, flokslæraran ella SSP-læraran. Er hetta ov torført, kann man fyrst tosa við ein vin, sum síðani kann hjálpa við at siga tað við ein vaksnan. Nógv børn vita ikki av, at júst sum børn hava ávís rættindi, so sum at ganga í skúla og fáa mat, so hava tey eisini rætt til hjálp við happing. Happing kann vera trupulleikin hjá børnunum, men ábyrgdin hjá teimum vaksnu.

## Nýt ein ella fleiri av hesum spurningum til at útgreina kjakið:

### Spyr:

Ímynda tær, at onkur sigur, at tey hata teg og gera gjøldur burtur úr tær, líka mikið hvar tú fert í skúlanum. Ímynda tær so, at hetta verður gjørt á internetinum. Hvussu eru hesar støður líkar? Hvussu eru tær ólíkar?

- Gott er, um næmingar verða leiddir til at hugsa um, at líka mikið hvussu tú verður happaður, verður tann happaði keddur.
- Ein munur er, at til ber at sleppa burtur frá happing, sum fer fram andlit til andlits, meðan tað ikki ber til eins lætt, um happingin er á netinum.
- Happing á netinum er ofta meira almenn enn happing, sum fer fram andlit til andlits, tí nógv fólk kunnu síggja og deila almenn boð og viðmerkingar.
- Tó so, happing á netinum kann eisini fara fram óalment. Til dømis kunnu happarar senda privat boð, uttan at nakar veit av.

**Spyr:** Hvørji ráð høvdu tit givið floksfeløgunum, sum hava skrivað hesi boðini til Martu?

- Gott hevði verið at koma fram til hesi ráð:
  - At hugsa seg um áðrenn tey senda nakað avstað. Tað besta er, at man setur seg inn í støðuna hjá hinum og ímyndar sær, hvussu hin man fáa tað, tá hon/hann fær boðini.

- Hugsa um felagsskapin. Tað er ikki stuttligt hjá Martu at koma í skúla hvønn dag og vera í einum felagsskapi, sum ikki hevur tað gott, og tí kunnu floksfelagarnir heldur ikki trívast í felagsskapinum. Her kunnu floksfelagarnir heldur koma við hugskotum til, hvat teir kunnu gera saman sum flokkur fyri at fáa góðar upplivingar saman. T.d. spøl í fríkorterinum, ítrótt ella bjóða øllum við í Snapchat-bólkin hjá flokkinum.

## Spyr:

Hvat munnu floksfelagarnir hjá Martu halda um tað, teir hava gjørt?

## Dømi:

- Kanska siga teir, at teir gjørdu tað bara til stuttleika, og at teir ætlaðu ikki at særa nakran.
- Floksfelagarnir kunnu eisini siga, at teir hava loyvi til at siga tað, teir vilja, tí hetta er eitt frítt land, og vit hava talufrælsi í Føroyum. (Sannleikin er, at vit hava talufrælsi undir ábyrgd, og tað merkir, at vit ikki hava loyvi til at siga hvat sum helst um onnur fólk).

**Greið frá,** at vit hava nógv fleiri góðar enn vánaligar upplivingar á netinum. Tó so, eins og í gerandisdegnum kunnu støður koma í, har vit uppliva okkurt ódámligt, og tað er her, vit kunnu læra at handfara slíkar støður.

**Spyr næmingarnar,** um teir hava upplivað happing á netinum, tó uttan at nýta nøvn í søgunum. Bið teir kjakast um, hvussu tann happaði man hava havt tað. Um eingin hevur nakra søgu, kanst tú hjálpa við at spyrja nærri.

## Dømi:

- Hevur tú nakrantíð sæð nøkur boð á netinum ella á sosialu miðlunum, sum hava gjørt nakran keddan?
- Hvat hendi? Hví? Minst til ikki at nýta nøvn.

## *Samanumtøka: 5 minuttir*

Tú kanst nýta hesar spurningar til at kanna eftir, hvussu nógv næmingarnir hava skilt av boðskapinum.

## Spyr:

Kunnu tit siga mær nakrar av teimum kenslum, sum ein, ið verður happaður á netinum, situr við?

- Dømi: tey eru ill, kedd, í ringum lag, ráðaleys.

## Spyr:

Hvørjir munir og hvørjar líkheitir eru millum happing á netinum og happing andlit til andlits?

- Leið næmingarnar til at síggja, at happing á netinum er eitt slag av happing, sum tó ofta breiðir seg skjótari, longri, til fleiri fólk og kann henda nær sum helst; dag sum nátt. Tað er týdningarmikið, at næmingarnir kenna hesar munir, so teir eru førir fyri at handfara happing á netinum.

## Spyr:

Hvussu kunnu vit handfara happing á netinum?

- Goym boðini.
- Blokera happaran.
- Ikki svara ljótt aftur.
- Sig tað við ein vin.
- Tosa við ein vaksnan, sum tú hevur álit á.

*Uppgáva 3: 25 minuttir*

# Talgild útihýsing

Hendan uppgáva snýr seg um útihýsing frá talgildum felagsskapum. Endamálið er at vísa, at happing er fjølbroytt, og at útihýsing kann raka júst líka hart sum til dømis ljót orð. Harumframt skal tað geva næmingunum ítøkilig tól til, hvussu teir kunnu sleppa undan hesum slagi av happing.

## Greið frá:

Nú skulu vit tosa um eitt annað slag av happing enn flest børn tosa um, til dømis at fáa ljót boð. Henda happingin er meira fjald/ósjónlig; tað vil siga, at man heldur onkran uttan fyri, ignorerar og ikki bjóðar honum/henni við til ymiskt. Tá hetta endurtekur seg, er tað eisini happing.

**Spyr:** Hvussu kann ein ignorera onkran annan á netinum? Tosa um tað at dáma, fylgja og viðmerkja á sosialum miðlum og spølum.

## Spyr:

Hvussu halda tit tað kennist, tá ongum dámar eina mynd, sum tú leggur út á netið ella tekur eitt "like" burtur aftur aftaná at hava dámt tað? Greið frá, at tað at ignorera og útihýsa onnur á netinum kann eisini særa, líkasum uttan fyri netið.

**Greið frá,** at nú fara vit at lesa eitt bræv upp frá Hanusi, sum spyr um hjálp við útihýsing á netinum, og aftaná skulu vit taka støðu til tað. Hetta er eitt veruligt bræv frá einum barni, men vegna tagnarskyldu er navnið broytt.

### Les brævið hart:

*Hey. Eg eri ein drongur (12 ár), sum vanliga hevur tað fínt í skúlanum. Bæði við vinum og við heimarbeiði, men í seinastuni varð eg varugur við, at har eru fleiri Snapchat-bólkar, sum eg ikki eri blivin boðin við í, men sum allir mínir vinir eru við í, og tað ger meg rættiliga keddan, tí tá eg so eri saman við teimum, so skriva teir næstan bara inni á Snapchat bólkunum ella fortelja mær, hvat hini skriva um har inni, og tað ger meg keddan, tí eg eri limur í tí eina bólkinum í flokkinum, men ikki øllum. Eg helt annars, at eg var væl dámdur í flokkinum, tí eg spæli fóltbólt við fleiri av dreingjunum í flokkinum, men tað eri eg so ikki kortini? Hvat skal eg gera...?*

*Heilsan Hanus.*

Nú skulu næmingarnir taka støðu til søguna hjá Hanusi við at stilla seg á eina virðislinju frá 1-10.

**1 = Tað er í lagi at hava privatar bólkar**

**10 = Tað er ikki í lagi at hava privatar bólkar**

**Greið frá,** at næmingarnir skulu ímynda sær, at ein linja gongur tvørtur um stovuna frá 1 til 10, har 1 merkir, at tað er í lagi at hava privatar bólkar, og 10 merkir, at tað ikki er í lagi at hava privatar bólkar. Bið næmingarnar stilla seg á tað talið, ið teir eru mest samdir í. Tað ber til at velja 2, um man heldur, at tað er næstan altíð í lagi ella 5, um man heldur, at tað er í lagi at hava privatar bólkar, men ikki altíð.

## Hvat heldur tú?

**Tað er í lagi at hava privatar bólkar**




**Tað er ikki í lagi at hava privatar bólkar**

Tá næmingarnir hava stillað seg á eitt tal, spyr so, hví teir standa, har teir standa.

Virðislinjan skal lata upp fyri einum kjaki um, hvar markið gongur til onkur verður hildin uttan fyri, og hvussu øll kunnu syrgja fyri, at eingin upplivir seg útihýstan ella happaðan. Tað er týdningarmikið at leggja dent á, at einki svar er skeivt.

## Uppskot til útgreinandi spurningar:

### Spyr:

Hvat kunnu vit gera, um vit uppliva, at onkur verður útihýstur og ignoreraður, ella um vit sjálvi uppliva hetta?

### Dømi:

- Vit kunnu bjóða tí útihýsta við í bólkin. Um vit fegin vilja hava ein privatan bólk, kunnu vit gera ein nýggjan, har persónurin kann vera við.
- Legg til merkis, at tað ikki altíð eru tey somu, ið ikki eru við.
- Legg til merkis, at eingin er einsamallur.
- Spyr tey, sum hava bólkin, um man sjálvur kann vera við. Tað er ikki vist, at tey í bólkinum vita, at man fegin vil við.
- Ger sjálv/ur ein bólk fyri tey, man vil vera í bólki við, aftan á at hava tosað við tey.
- Tosa við ein vaksnan, tú hevur álit á – tað kann vera ein lærari, foreldur, námsfrøðingur, venjari, systkin, mostir o.s.fr.

### Spyr:

Nær er tað í lagi at hava ein privatan bólk, og nær er tað ikki?

### Dømi:

- Har er eingin ávís regla fyri, nær tað er í lagi ella ikki í lagi. Vit mugu øll leggja til merkis fólkini rundan um okkum fyri at vera vís í, at tey ikki eru einsamøll.
- Gev dømi um at tað í flestu førum er í lagi at hava ein privatan bólk, um vit til dømis eru sera góðir vinir, hava ein felags áhuga ella skulu gera ávísar avtalur, ið ikki eru viðkomandi fyri øll (t.d. fótbóltvenjing). Tá talan tó er um ein heilan flokk, sum hevur ein bólk, og nøkur tá ella ein ikki er boðin við, er hetta ikki í lagi.

*Næmingaskjal 1*

# TikTok-søgan

Les brævið hjá Martu og svara síðan spurningunum. Hetta er eitt veruligt bræv frá einari gentu, ið hevur biðið um hjálp. Vegna tagnarskyldu er navnið broytt.

*Hey, fyri umleið einum hálvum ári síðani var eg MEEEGA nógv á TikTok!*

*Ná, men ein dag fór eg inn og sá, at eg hevði fingið trý boð frá onkrum. Tað var ikki so ofta, at hetta hendi, so eg bleiv mega glað. Men tá eg trýsti á boðini stóð sovorðið sum: "Tú ert vemmilig!" Og so stóð eisini: "Tú ert ljót! Um tú vísir nøkrum hesi boðini, so fært tú bank í skúlanum mánadagin! Skilur tú?" Eg strikaði boðini og meldaði brúkaran. Tey fóru nokk ikki at banka meg av ordiliga. Og eg hevði rætt. Alla vikuna hendi einki.*

*Nakrar vikur seinni hevði eg knappliga fingið 23 boð. Eg lat tey upp og fleiri vóru frá nøkrum í mínum flokki – sjálvt frá mínari bestu vinkonu.*

*Fólk fóru at ignorera meg. Eg fekk fleiri hatiboð, og eg meldaði til TikTok, og tey blivu burturvíst. Men har komu fleiri. Til síðst kláraði eg tað ikki meira. Eg veit ikki, hvat eg skal gera. Skal eg siga tað við mammu og babba, ella skal eg vóna, at tað steðgar? Heilsan eg.*

*– Marta, 13 ár. "*

Snýr henda søgan seg um happing á netinum? Grundgev:

Hvussu heldur tú, at Marta hevur tað?

Hví heldur tú, at fleiri í flokkinum skrivaðu hesi boðini – eisini besta vinkonan?

Hvussu kann mann melda onkran á TikTok?

Hvat heldur tú, at Marta skal gera?

# Heimasetningur

*– saman við foreldrum/vaksnum*

# Hvat er happing á netinum?

Internetið er aloftast eitt gott stað at vera við nógvum spennandi møguleikum. Onkuntíð verður internetið tó nýtt á óhepnan hátt.

Happing er happing, líka mikið um tað er á netinum, í skúlagarðinum ella onkra aðra staðni, og vit hava øll ábyrgdina av, at vit hava tað gott og trívast.

Munurin millum happing á netinum og happing í skúlagarðinum er, at happing á netinum kann henda nær sum helst, og at happarar kunnu vera dulnevndir, soleiðis at tú ikki veitst, hvør happarin er.

Vit hava í dag arbeitt við at seta okkum inn í kenslurnar hjá øðrum, so vit nú vita, hvussu ein, ið verður happaður, hevur tað.

## Heimauppgáva 1:

- Nevn trý góð ting, vit finna á netinum.
- Nevn trý minni góð ting, ið kunnu henda á netinum.

## Heimauppgáva 2:

- Setið orð á kenslurnar. Ein, ið verður happaður á netinum, kann sita við hvørjum kenslum?

Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

PRENT: FØROYAPRENT | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705